

*Deyvir konfirmantar í 1924 í Fredericia. Hilmar stendur í aftasta rað longst til vinstru*



*Hilmar við model av slupp, hann hevur gjørt*

mús hesi árini, og hetta minkaði um áhugan at sigla.

## »Mundi fallið í krígnum á súkklu«

Á heysti í 1936 fer Hilmar tí við Tjaldrinum til Danmarkar, har hann fær arbeiði sum "landbrugslærling" á einum bóndagarði tætt við Haderslev, har hann var í 3 ár.

Í 1939 var hann húskallur á einum bóndagarði við Batum í Jyllandi. Ein dagin hann arbeiddi á garðinum í apríl 1940 varð brádliga so myrkt. Hilmar hyggur upp og sær nógv týsk flogfør. Hann sá eisini nógvar týskar hermenn marsjera eftir vegnum. Seinni fekk hann so at vita, hvat ið var áfatt, Danmark var hersett.

Í 1940 verður hann biðin at vera forpaktari á " Hjemmet for Døve Mænd " í Nyborg

Til hetta heimið hoyrdi stórur urta- grønmetis- og høsnagarður, sum hesir deyvu menn skuldu passa, tí her fingu teir part av teirra kosti.

Her er Hilmar í fimm ár. Ein av stuttligu søgunum frá Nyborg, er, at ein dagin eru Hilmar og ein annar deyvur maður farnir á tandem-súkklu ein túr. Teir eru helst komnir ov tætt, har ið týskurin helt til. Teir hoyra ikki, at tað verður rópt eftir teimum um at steðga, so teir súkkla víðari. Onkur fær tó steðga teimum, men tá vóru teir um at verða skotnir á staðnum av týskarum. Hetta hevur Hilmar ofta flent eftir, "at hann mundi fallið í krígnum á eini súkklu."

Hilmar hoyrdi heldur ikki luftávaringarnar, so hann svav altíð væl, hvussu tær ýldu. Hann minnist bert eina ferð at vera farnan í ein kjallara vegna luftávaring. Hilmar var farin út at spáka. Tá kemur ein eldri kona rennandi móti honum og fer oman í ein kjallara. Hann fer aftaná, tá ið hann skilir, hvat ið er áfatt.

Tað var annars ringt hjá honum ikki at kunna hava samband heim til síni. Alt samskifti var jú kvett. Ein skipan fekst tó við Reyða Kross brøvum, men í hesum kundu bert vera 25 orð. Tað tók eisini langa tíð hjá hesum brøvum at koma fram.

Hilmar minnist eisini, tá ið kríggið var av. Hann fór út at hyggja at, meðan týskararnir fóru avstað. Tað var ein syrgilig sjón at síggja teir: illa løstaðir menn, innvavdir í bandagum, summir høvdu mist lim ella limir. Allir royndu sum fræggast at koma umborð á skipið í Nyborg, sum skuldu føra teir heim til teirra sundursoraða heimland.

Í 1945 fer Hilmar til eina familju í bygdini Stendis nærhendis býnum Sunds í Jyllandi. Bæði maður og kona vóru deyv, men tey áttu fimm børn, sum øll hoyrdu. Henda familja hevði keypt jørð úti á heiðini "heden", og hetta skuldu dyrkast upp. Hilmar sigur, at hetta var sera, sera hart arbeiði. Har var hann í 3 ár.

Í november 1949 fer hann heim aftur til Føroyar í gullbrúdleyp hjá foreldrunum.

## Aftur til skips

Í 1950 fær Hilmar hýru við Grønlandsfarinum við Alexander Ortind sum skipara. Teir eru í Grønlandi í 5 mánaðar. Tað var p/f Hólmur í Sørvági sum átti skipið.

Í 1951 er hann aftur í Danmark á bóndagarði í Sunds nærhendis Viborg, men hann kemur heim aftur.

Í 1952 er hann við trolaranum Varðberg, har teir fiska uppí við Norðurnoreg. Teir fáa fulla last, sum teir selja í Keypmannahavn, og harfrá fer Varðberg til Leith á beding. Teir fara nýggjan túr í Barenshavið og fáa aftur fulla last, sum teir landa í Føroyum.

Seinni í 1952 var hann aftur við Grønlandsfarinum. Hann skrivaði grein um hendan túrin, sum er endurgivin seinni í hesi Miðviku.

Longu árið eftir sakk Grønlandsfarið, tá ið tað var móðurskip hjá útróðrarmonnum í Grønlandi. Tað var illveður og tjúkt, tá ið skipið tók, og tað sakk nærum beinanvegin. Menn mannskaði hendi tíbetur ikki.

Í 1953 er Hilmar aftur í Danmark og arbeiðir á sama bóndagarði við Sunds nærhendis Viborg.

Í 1954 er Hilmar við sluppini Henry Freemann, og næstu árini er hann við Akranes og Sílinum.

Í 1957 er hann við sluppini Elisabeth úr Sandavági, har John Nielsen er skipari. Har var hann við í trý ár. Teir royndu við snøri. Elisabeth var eitt av teimum skipum, sum hildu longri á at veiða við snøri enn hini skipini, sum tá vóru farin yvir til snellu.

Í 1960 fer Hilmar við Tinganes, skipari er Richard Jacobsen í Klaksvík.

Ein spurningur er sjálvsagt hvussu tað kundi samskiftast við ein deyvan umborð. Richard gekk altíð í tuflum. Skuldi hann hava samband við Hilmar, so trampaði hann hart í dekki nakrar ferðir og tað føldi Hilmar.

Hilmar hevur dugað væl at nýta sínar sansir. Teir róðu út



*Stóri bóndagarðurin í Suðurjútlandi, har ungir deyvir menn kundu læra at arbeiða í tí danska landbúnaðinum. Her var Hilmar í 3 ár*



*Hendan myndin man vera tikin umborð á koltrolaranum Varðberg. Tað er Hilmar við toskinum. Hvør man hin maðurin vera?*

við bátum við Tinganesi og ein dagin teir vóru úti, biður Hilmar teir um at fara at sigla til aftur til Tinganes, tí tað verður óveður. Hinir á bátunum slóðu hetta upp í glens, tí veðrið var gott og teir hildu á at fiska. Men løtu seinni brennir hann á við nógvum vindi, og teir høvdu ein ringan túr aftur til skipið. Eftir hetta lurtaðu teir altíð eftir Hilmar, táið hann segði frá ringum veðri.

Hilmar hevði eisini eina kenslu av, hvar fiskur kundi vera at fáa. Hinir kallaðu hann "fiskikongurin."



*Hilmar sum ungur »sheikur«*

## Tinganes søkkur

Hilmar er við Tinganesi í 4 ár, men í 1963 søkkur Tinganes á Kappanum á veg heim. Skipari tá var Anton Hansen í Norðragøtu.

8. September sigldi Tinganes á ein boða í sundinum norðanfyri Eggersoy og sakk eftir sløkum tveimum tímum.

Øll manningin 27 manns varð bjargað av føroyskum skipum, sum royndu á somu leið.

Teir royndu við bátum og vóru á veg til Kappan. Teir høvdu ekkoloddið gangandi, meðan teir sigldu norður gjøgnum sundið við seks míla ferð. Men knappliga fór at grynnast óhugnaliga skjótt. Skiparin koplaði motorin úr og royndi at snara henni á bakborð, men orsakað av streyminum vildi hon fara á stýriborð, so hann koplaði í aftur. Í somu løtu sigldi teir á grunt. Hon tók framman, men var leys aftur beinanvegin.

Tinganes var farin at leka. Teir royndu at pumpa við dekspumpum, men sjógvurin bara vaks í skipinum.

Gummibátarnir vórðu fyrst settir út, og nakrir av útróðrarbátunum umborð. Nú tyngdist Tinganes so nógv, at skiparin ikki vildi hava ábyrgdina av manningini umborð, og teir fóru í bátarnar.

Í somu løtu kom línuskipið Vesturvón úr Sørvági til hjálpar. Menninir høvdu loyst bátarnar á Tinganesi, og Vesturvón setti lossibummin á nakrar aðrar av teimum.

Fáar minuttir seinni sakk Tinganes við afturendanum fyri á 76 favna dýpi. Summir av monnunum vóru tá í bátunum og summir umborð á Vesturvón.

Seinni fór øll manningin umborð á Vesturvón, og